# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# GLANTRILEIKUR OG SJÁLVRÓS

At politikkur er glantrileikur gongur so mangan sjón fyri søgn. Tað eru ikki tær týdningarmestu avgerðirnar, sum fáa mesta rásarúmið, meðan onnur smámál, sum als ikki eiga at verða mál, verða blást upp.

Vit hava sæð tað í Javnaðarflokkinum seinastu dagarnar. Flokkurin er komin í rættiligt ódnarveður, tí ting- og landsstýrismanningin hjá flokkinum í frustratión sendi út eina eftirlýsing eftir Gerhardi Lognberg. Leygardagin savnaði flokkurin so ovasta floksapparatið at loysa gordiska knútin. Loysnin er sambært flokkinum, at øll tingfólk eiga at møta til ásettar fundir, og hesa treyt hevur Gerhard Lognberg lovað at gingið undir.

Hetta er dømi um eitt mál, sum als ikki átti at komið so vítt. Hetta er eitt mál, sum flokkurin átti at loyst innanhýsis. Júvíst eru summi fólk ómøguligari enn onnur. Tað er eisini sjón fyri søgn í Javnaðarflokkinum. Men hetta er eisini politikkur, men um hetta fer at javna seg, fáa vit at síggja.

Í gjár fingu vit eitt annað margháttligt bræv. Hesaferð var tað Jørgen Niclasen, sum var farin í blekkhúsið. Hann er so fegin um, at tað hevur eydnast Fólkaflokkinum at forða landskassanum at seta pengar í at endurreisa Eik: *»Hóast trýst í fýra umførum, helt Fólkaflokkurin fast. Landsstýrið eigur ikki at stilla seg fyri marknaðarkreftunum«*, skrivar Jørgen Niclasen.

Tað er áhugavert, at uttanríkisráðharrin insinuerar, at »onkur« – tað má so í minst trimum av førunum vera Finansiel Stabilitet – hevur lagt trýst á landsstýrið fyri at fáa prísin fyri Eik upp. Tað eru áhugaverdir og vælsaktans álítandi upplýsingar sum uttanríkisráðharrin í heimastýrinum Føroyum kemur við – uttan at vit hava blandað WikiLeaks uppí.

Men tá fólkafloksformaðurin sigur, at Fólkaflokkurin var garanturin fyri, at *»landsstýrið eigur ikki at stilla seg fyri marknaðarkreftunum«*, so loypir ketan av. Er tað ikki júst tað, sum Fólkaflokkurin er trygdin fyri? Er tað ikki Fólkaflokkurin,



sum er trygdin fyri, at vit ikki hava ein fiskivinnupolitikk, sum byggir á marknaðarkreftirnar? Er tað ikki Fólkaflokkurin, sum *stillar seg fyri marknaðarkreftirnar* og harvið tryggjar, at vit hava eina fiskivinnu, sum ikki verður rikin á mest rationellan og burðardyggan hátt?

Tað er ikki serliga álitisvekjandi, at politikarar soleiðis koma fram og eftirrationalisera og sum í hesum føri taka sær ábyrgdina av, at tað gekk – eftir teirra tykki – væl. Tað skuldi bara manglað, at landsstýrið gjørdið tað sum best var fyri landið og fólkið. Skalt tú hava rós, Jørgen, lat so onkran annan gera tað. Sjálvrós stinkar!

**» Skalt tú hava rós Jørgen, so lat onkran annan rósa tær**

---

# Valdu fyrrverandi arbeiðsgevara til fakfelagsboss



Nýggja nevndin í felagnum Føroysk Miðlafólk. Fremst frá vinstru Georg L. Petersen, Anna Ellingsgaard og Jógvan Hugo Gardar. Aftanfyri frá vinstru Katrin Petersen, Árni Conradsson, Jógvan Jákupsson og Emil L. Jacobsen

Ein fyrrverandi arbeiðsgevari hjá journalistum og fotografum er nú fakfelagsformaður.

Á aðalfundi leygardagin hjá Felagnum Miðlafólk fekk felagið nýggjan formann.

Formaðurin seinastu fýra árini, Anna V. Ellingsgaard, bar seg undan afturvali í formanssessin. Og í hennara stað varð valdur Georg L. Petersen, sum arbeiðir á Dimmalætting

Hini í nevndini eru Anna Ellingsgaard, Jógvan Hugo Gardar, Emil L. Jacobsen og Katrin Petersen. Eykalimir eru Árni Conradsson og Jógvan Jákupsson.

Fundurin varð hildin í Handverksdeplinum, sum Føroysk Miðlafólk hevur gjørt avtalu við um skrivstovusamstarv.

Tað er ikki vanligt, at ein fyrrverandi arbeiðsgevari verður fakfelagsleiðari. Georg L. Petersen var blaðsstjóri á Dimmalætting frá 1995 til 2002 - tey síðstu árini sum ábyrgdarblaðstjóri. Hann segði starvið frá sær, starvaðist eitt skifti sum journalistur í sjónvarpinum, til hann kom aftur í starv í táverandi familjufyritøkunum, har hann enn starvast - men nú sum vanligur blaðmaður.



**» Marknaðurin megnaði Eik**

JØRGEN NICLASEN
KJAK Á SÍÐU 24



**» Løgin lovprísan av sær sjálvum**

JÓANNES EIDESGAARD
KJAK Á SÍÐU 22

# Jógvan fer aftur í grand prixið

– Eg var so nær við at vinna seinast. Einans 223 atkvøður vóru millum meg og vinnaran, so eg vil royna meg enn einaferð, sigur Jógvan Hansen, sum 29. januar aftur skal royna seg í íslendska Eurovison.

Eurovision er aftur á skránni í Íslandi, og klaksvíkingurin Jógvan Hansen telist enn einaferð millum luttakararnir í kappingini.

Fyri Jógvan Hansen hevur luttøkan í fjør veruliga givið úrslit, og nú vil hann royna seg enn einaferð í kappingini.

– Tað hevur ótrúliga nógv at siga fyri ein tónleikara at vera við í eini kapping, sum øll fylgja við, sigur Jógvan Hansen.

Hann vísir á, at síðani hann var við í kappigini í fjør, hevur hann fingið tónleik sendandi úr Onglandi, Danmark, Spania, Grikkalandi og øðrum londum.

Jógvan dylur ikki fyri, at hann í ár vil vinna kappingina.

– Eg havi altíð vónir um at vinna. Um tú ikki stílar høgt, kemur tú ikki hálvan vegin. Kanska pessimisturin at enda fær rætt, men optimisturin hevur tað nógv stuttligari á vegnum, sigur Jógvan Hansen.

– Eg havi altíð vónir um at vinna. Um tú ikki stílar høgt, kemur tú ikki hálvan veg. Kanska pessimisturin hevði rætt, men optimisturin hevði tað nógv, heldur Jógvan Hansen.



Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*